# Kom og síggj fyrsta bilin í Føroyum

**Á ólavsøkuframsýningini hjá Føroya Ellisakførum ber til at síggja fyrsta bilin, sum kom til Føroyar í 1922**

TÍÐINDASKRIV

Á ólavsøkuframsýningini hjá Føroya Ellisakførum, sum er í framsýningarhøllini hjá P/F Wenzel í Havn, ber til at síggja tann fyrsta bilin, sum kom til Føroya. Ella næstan…

Tann fyrsti bilurin í Føroyum, sum kom til landið við DFDS-skipinum "Island" hin 6. mai í 1922, er tíverri burtur. Men Hans Elmar Poulsen í Vatnsoyrum hevur ein sama slag bil, ein Ford TT frá 1922. Hetta



*Hetta er ein Ford A frá 1930. Hann hevur tvær hurðar, og var hann ein vanligur bilur tá á døgum. Vinstrumegin sæst Ford TT lastbilurin frá 1922, sum var hin fyrsti í Føroyum*

Tí verður dentur lagdur á Ford á ólavsøkuframsýningini. Har ber m. a. til at síggja tveir Ford T, tann fyrr nevnda, sum var hin fyrsti í Føroyum, og ein eldri Ford T persónbil frá 1915 – hann er átøkur bilinum hjá Bedstemor And, sum vit kenna so væl.

Síðani eru tríggir Ford A frá umleið 1930. Tveir teirra í allar fínasta standi, ein luxusbilur, Ford T Coupé við "svigermor"-setri aftanfyri, og ein Ford T persónbilur við tveimum hurðum. Eisini verður ein Ford T frá 1930 við fýra hurðum, sum ikki er settur í stand, at síggja. Her ber til at síggja ein bil – ella tað, ið eftir er av bilinum, sum einaferð verður eitt vakurt ellisakfar. Hendan bilin hevði Finnur Johansen við sær úr Danmark fyri fleiri


*Hetta er ein Ford A Coupé frá 1931. Ein sportútgáva av tí traditionella Ford A*


*Ford Anglia: Vanligur bilur í sekstiárunum. Sermerktur var hann við tí øvuta bakrútinum, sum helti aftureftir*


*Ford Capri: Hesir vóru vanligir seinast í sekstiárunum og í sjeytiárunum.Ein vakur sportbilur*


*Ford T 1915: Elsti bilur í Føroyum. Hesin er 88 ára gamal, og var hann longu "gamal", tá bilaøldin byrjarði í Føroyum í 1922*

er fyrstu ferð, at hesin bilurin verður at síggja á ólavsøkuframsýninginin hjá Føroya Ellisakførum, sum letur upp leygardagin 26. juli kl 15. Framsýningin er opin leygardagin, sunnudagin og báðar ólavsøkudagarnar frá 15-20.

Í síðsta mánaði vórðu liðin 100 ár síðani, at Ford verksmiðjan varð stovnað. enn fjøruti árum síðani. Hann hevur ikki koyrt seinastu 30 árini, men hevur verið væl varðveittur.

Av "nýggjaru" Fordbilum kunnu nevnast Ford Anglia, Ford Capri og Ford 20 M, sum vóru vanligir í seksti og sjeytiárunum. Eisini verður høvi at síggja ein spildur nýggjan StreetKa – tað er ein sera snøggur Ford Ka Cabriolet sportvognur.

Aðrir bilar verða eisini at síggja, eitt nú gamlir brandbilar, m. a. 70 ára gamli Triangelbrandbilurin hjá Tórshavnar Sløkkiliði, ið er settur í upprunastand. Hann er sera sjáldsamur og ógvuliga hegnisliga umvældur av sløkkiliðsmonnunum.

Av øðrum bilum kunnu nevnast ein Austin Seven hjá Derek Brockie, sum verður settur í stand, tveir Mercedes Benz, annar frá 1961 og hin frá 1966, Volvo 144 frá 1971, Volvo Amazon frá sekstiárunum og Fólkavognar frá fyrst í sjeytiárunum. Eisini verður onkur Opel Kadett og Opel Rekord, ein MGA, tveir Triumph Spitfire og ein Opel Blitz lastvognur frá fimmtiárunum. Afturat hesum verður ein Ferrari frá 1982 eisini at síggja.

Ellisakfør eru ikki bara bilar – motorsúkklurnar eru helst fleiri í tali. Út við 30 motorsúkklur og knallertir verða at síggja. Har verða fleiri BSA, eitt nú onkrar, ið keyptar vórðu frá eingilskmonnunum aftan á kríggið, har verða nakrar Triumph, Harley Davidson frá 1962, Nimbus frá 46 og 52, ein Sunbeam og nakrar nýggjari súkklur so sum Yamaha, Kawasaki og so nakrar knallertir so sum Puck Maxi, Kreitler, Tempolet o. s. fr.

Hóast tað hevur verið siður at Føroya Ellisakfør sýna fram akførini á ólavsøku, so eru nøkur ár síðani, at framsýning var seinast, og tí eru nógv "nýggj" ellisakfør at síggja hesaferð. Saman við atgongumerkinum fæst eisini blaðið hjá Føroya Ellisakførum, sum nú eitur "Hjólið", sum hesaferð er givið út í sambandi við framsýningina.

Umframt ellisakførini verður stór myndaframsýning í sýnir ferðslu og akfør í gomlum døgum, til ber at keypa sær okkurt til matna og okkurt leskandi í sølubúð, og til ber eisini at bjóða upp á onkur av ellisakførunum, sum verða lýst til sølu.

Føroya Ellisakfør hevur 130 limir, og endamál felagsins er at skapa umstøður og karmar til at varðveita gomlu akførini í uppruna standi. Síðani felagið varð stovnað eru nógv akfør fingin til vega, og lógir og reglugerðir eru broyttar soleiðis, at t. d. einki avgjald er á innfluttum akførum, sum eru eldri enn 25 ár. Fyrimunarlig avtala er eisini við Tryggingarfelagið Føroyar um trygging, og ellisakfør rinda ikki vegskatt.

Eitt av endamálunum við hesi framsýning er at savna pening til verkætlanina at seta gamla vatnbrunnin undir Gráasteini í Havn í stand til eitt tekniskt savn. Atgongumerkið kostar 50 krónur, og børn sleppa ókeypis inn saman við vaksnum.



*Hjólið, nýggja limablaðið hjá áhugafelagnum Føroya Ellisakfør, sum øll tey ið vitja framsýningina fáa ókeypis*



VIÐMERKINGAR

## Hvør dagur er ein møguleiki

**Kristina Háfoss**
*Løgtingskvinna fyri Tjóðveldisflokkin*



Viðmerking mín til Johan Dahl og ikki minst til manglandi nýskipanina í nýskipanaruppskoti Sambandsfloksins fekk eftir øllum at døma umboð Sambandsfloksins at vakna við kaldan dreym. Ikki bert Johan Dahl svaraði aftur, men somuleiðis formaður Sambandsfloksins - Lisbeth L. Petersen. Eg fari hervið at gera nakrar viðmerkingar til aftursvar teirra.

**Heimastýrisskipanin - eitt leikhús**

Sum væntað vísa tey bæði á, at tað er Tjóðveldisflokkurin, ið "spælir sjónleik", meðan Sambandsflokkurin grundar alt á „veruleikan". Okkurt skulu tey jú siga - men við hesum hava tey misskilt ta mynd, ið varð nýtt í undanfarnu grein míni.

Tá sipað varð til, at føroyingar fremja tann leiklut, ið okkum verður tillutað og at hetta gongur fyri seg í einum leikhúsi, har danska stjórnin er leikstjóri - ja, so myndar hetta tann søguliga veruleikan, ið hevur víst seg seinastu mongu árini.

Heimastýrisskipanin er sum eitt leikhús, har føroyingar meta seg hava nakað at siga, men í veruleikanum er hetta alt ein óveruligur sjónleikur. Tí tá á stendur er tað tann leikur og tann kós, ið danska stjórnin vil hava at føroyingar velja - ið vald verður.

Hetta varð eitt nú 1946 eitt dømi um, og er avlýsingin av fólkaatkvøðuni nýggjasta og greiðasta dømið um hetta.

**Sambandsflokkurin fjalir veruleikan**

Tá sambandsfólk vórðu umtalað sum klappandi áskoðarar í leikhúsinum varð hetta ein mynd av, at sambandsfólk - úr alskyns flokkum - taka undir við hesi gongd, har tað er danska stjórnin, ið setur dagsskránna, meðan føroyingar fylgja henni.

Og hesin leikur heldur áfram, so leingi valt ikki verður at fara út um heimastýrisskipanina - leikhúsið - og seta føtur undir egið borð. Tá kemur veruleikin til sjóndar.

Tann veruleiki - at føroyingar eru fult líka so væl fyri sum øll onnur sjálvstøðug fólk at leiða og taka ábyrgd av egnum landi. Hetta er ein veruleiki, ið Sambandsflokkurin ikki kann broyta - men roynir at fjala. Tí sambært Sambandsflokkinum er tað eftir øllum at døma betur fyri føroyingar at lata føroyska fullveldið til danir umsita. Óskiljandi.

**Sambandshugburðurin**

Sambandshugburðurin kemur ikki minst til sjóndar í aftursvarinum frá LP. Tí LP skrivar m.a. at tað er betur at danir umsita føroysku rættarskipanina tí annars verður rættartrygdin sett í vanda. Enn eitt dømi um sambandshugburðin, ið tykist at verða grundaður á, at onnur kunnu gera alt betur enn vit. Hetta er ikki sørt "fornermandi" mótvegis føroyingum.

Um Sambandsflokkurin ikki hevur álit á sær sjálvum og álit á, at føroyingar kunnu skapa teir karmar sum skulu til í einum framkomnum vælferðar- og rættarsamfelagi - ja, hvussu kann hesin flokkur tá bjóða seg fram at leiða eitt land ?

JD sigur at enda í grein síni, at " The show definetely need to go on - but with more serious players than the present." JD er vælkomin at halda áfram við framførslunum, tí sum sagt varð í fyrru viðmerking míni, so eru øll hini - ið hava alit á, at føroyingar klára at leiða hetta landið sjálvir - farin at taka leiktjøldini niður og fyrireika seg til eina sjálvstøðuga framtíð.

**Hví rinda fyri danskt NATO-limagjald ?**

Viðvíkjandi NATO-limagjaldinum, so vísir LP á, at vit áttu kanska at verið errin av, at vit eru við til at rinda okkara part. Her verður helst skipað til okkara part av danska limagjaldinum í NATO.

Men Lisbeth - tíbetur eru fólk, ið ynskja einar sjálvstøðugar Føroyar, ikki errin av hesum.

Tað hevði hinvegin glett okkum um leiktjøldini vórðu tikin niður og veruleikin kom til sjóndar. Tann veruleiki - ið vísir, at ríkisstuðulin, ið verður sendur landskassanum á hvørjum ári er ein nógv, nógv minni upphædd enn tann, ið vit missa við at vit ikki umboða okkum sjálvi í altjóða samfelagnum.

**Hvør dagur er ein møguleiki**

LP sigur at enda í grein síni, at "vit vilja ikki forkoma teim møguleikum vit hava og spæla við lagnu føroyinga."

Men hetta er tað júst tað, ið gjørt verður, tá føroyingar verða forðaðir, ið at velja millum teir møguleikar, sum øll sjálvstøðug lond hava, og so leingi "spælt" verður við lagnu føroyinga sum altjóða viðurkend tjóð.

Fyri hvønn dag vit bíða við at taka fulla ábyrgd og leiðslu í hesum landi - missa vit møguleikar og spæla við lagnu føroyinga.

Hinvegin eru vit í tí góðu støðu, at hvør dagur ein møguleiki at velja øðrvísi - at velja framburð, frælsi og framtíð framum ríkisrættarligt status quo og fortíð.

# FM-kappríðing á Ólavsøku



TÍÐINDASKRIV

Ólavsøkudag kl. 14.00 verður kappríðing á ríðibreytini uppi í Marknagili.

Hetta er tann triðja av fimm FM kappríðingum í ár.

Enn er spenningur í toppinum. Sólvindur hjá Maritu Askham, og Rán hjá Kristfríð Jacobsen eru púra jøvn við hvør sínum 12 stigum. Nærmast teimum er Lokkur hjá Rólant Reinert við 7 stigum.

Tey seks fremstu rossini fáa stig í FM kappingini. (7,5,4,3,2,1) Eisini tey ungu kunnu ogna sær stig í hesi somu kapping.

Afturat FM kappingini eru eisini ymisk ferðasteyp, ið kappast verður um, bæði millum tey ungu og tey vaksnu.

Kappast verður í tvíspor í trimum bólkum: Ung, 2. flokkur og 1. flokkur. Kappast verður eisini í travi.

Møguleiki verður at keypa sær ein køkubita og okkurt drekkandi afturvið.